Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 11. okt. 2022
Mál nr.: 22/15353
Málsviðgjørt: ARØ

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan (Barsilslógin), sum einast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 21. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 13. Barsilspeningur er 100% av útrokningargrundarlagnum sbrt. § 12, tó soleiðis, at barsilspeningur ikki kann vera meira enn kr. 25.000 um mánaðin umframt eftirlønargjaldið sbrt. § 14 b.Galdandi orðingar	**1.** Í § 13, stk. 1, verður "kr. 25.000" broytt til: "kr. 27.000".
§ 17. ... *Stk. 2.* Gjaldskyldug smbrt. stk. 1 eru 1. øll, sum fáa A-inntøku, sum hava fulla skattskyldu í Føroyum, og sum hava fylt 16 ár, men ikki 67 ár, og 2. ... *Stk. 3.* ...	**2.** Í § 17, stk. 2, verður "smbrt." broytt til: "sbrt.", og í nr. 1 verður "men ikki 67 ár" broytt til: "men ikki hava nátt fólkapensjónsaldur sbrt. løgtingslóg um almannapensjónir o.a.".

Stk. 4. (Strikað).	
§ 18. Gjaldið verður kravt av øllum A-inntøkum, sum tey gjaldskyldugu fáa ella rinda, tó undantikið 1) fólka- og fyritíðarpensjón, 2) aðrar skattskyldugar almannaveitingar, tó ikki dagpening eftir dagpeningalógini, og endurgjald fyri inntøkumiss sbrt. § 17, stk. 3 í forsorgarlógini, 3) ... 4) ... *Stk. 2.* (Strikað).	**3.** § 18, nr. 1, verður orðað soleiðis: "1) fólkapensjón, fyritíðarpensjón og framskundað pensjón,". **4.** § 18, nr. 2, verður orðað soleiðis: "2) aðrar skattskyldugar almannaveitingar, tó ikki dagpening sbrt. løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m., endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sbrt. § 25 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og lønaríkoyti til tillagað starv sbrt. § 21 í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk,".
§ 19. Gjaldið hjá teimum gjaldskyldugu er 0,86% av tí í § 18 nevnda gjaldsgrundarlagi. *Stk. 2-4.*	**5.** Í § 19, stk. 1 og 4, verður "0,86%" broytt til: "0,89%".
	6. Aftan á § 23, men áðrenn yvirskriftina yvir § 24, verður sett: "**§ 23 a.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglur um, at upplýsingar skulu skrásetast og sendast Barsilsskipanini elektroniskt, og kann áseta nærri reglur um elektroniska samskiftið."